# Dagfinn skal døma finaluna

Fótbóltssambandið hevur gjørt av, at Dagfinn Olsen úr Rituvík skal døma finaluna í kappingini um Løgmanssteypið. Finalan millum KÍ og B36 verður spæld á Tórsvølli leygardagin 14. oktober.

Dagfinn hevur dømt í fremstu føroysku deildini í fleiri ár, og hann hevur eisini verið formaður í felagnum hjá dómarum. Sambært skipanini hjá FSF umboðar hann NSÍ sum dómari.

Hjálpardómarar í finaluni verða Dan og Edvard Højgaard, og fjórði dómari verður Páll Augustinussen.



# Óli verður ikki við í Fraklandi

Óli Johannesen gav í gjár avboð til landsdystin hjá Føroyum móti Frakandi mikudagin í næstu viku. Undan hesum var greitt, at Óli ikki fekk verið við móti Litava á Tórsvølli leygardagin, tí hann er leikbannaður til tann dystin. Nú hevur Óli fingið skaða, og hann verður ikki klárur til dystin í Fraklandi. Tí stendur greitt, at metmaðurin á landsliðnum heldur ikki verður við, tá føroyska landsliðið fer til Fraklands, og tað er uttan iva dyggur smeitur hja Jógvani Martin Olsen, landsliðsvenjara.





*Í samband við at Judofelag Føroya fylti 25 ár, nýtti felagið høvi at heiðra nøkrum teirra, sum hava gjørt eitt gott arbeiði innan judo í Føroyum. Heisr tríggir blivu heiðraðir leygardagin: Johannes Johannesen, formaður og venjari hjá Sunda Judofelag í meira enn 25 ár, Jan Günther, formaður og venjari hjá Havnar Judofelag í eitt mannaminni, og Sven Nørspang, ið stovnaði judo í Føroyum*

*– Næsta summar eru 12 ár liðin, síðani judo seinast var partur av Oyggjaleikunum, so tað vóru eini gleðiboð fyri Judosambandið, tá vit fingu at vita, at judo aftur bleiv partur av Oyggjaleikunum á Rhodos, sigur formaðurin í Judosambandinum, Sofus D. Johannesen*

### Nýggjar tíðir fyri judo í Føroyum

Nú standa so nýggjar avbjóðingar fyri framman hjá føroysku judofeløgunum og hjá Judosambandinum. Judo er aftur ein partur av Oyggjaleikunum, og her hava føroyingar vónir um at fáa góð úrslit, sigur Sofus.

– Vit arbeiða við at fáa eitt sterkt og breitt lið við til Rhodos. Ætlanin er at fáa tveir judarar í hvørjum vektflokki við til leikirnar, tí her eru nógvir góðir ungir judarar í landinum. Fleiri av eldru íðkarunum, sum vóru við at manna liðið á leikunum í 1995, eru givnir, og hetta gevur pláss fyri yngri kreftum.

Ein stórur trupulleiki er tó í føroyskum judo. Kvinnusíðan er ov veik, og har eru alt ov fáir kvinnuligir íðkarar, ásannar formaðurin í Judosambandinum.

– Trupulleikin hjá okkum til Oyggjaleikirnar á Rhodos er uttan iva kvinnusíðan. Tað eru alt ov fáar kvinnur, sum íðka judo, og tí er støðið eisini lægri, enn tað kundi verið. Eg vóni, at oyggjaleikaluttøkan fer at broyta hetta, og at kvinnurnar eftir leikirnar á Rhodos fara at fáa størri áhuga fyri judo.

### Judo skal gerast fastur táttur á leikunum

Tað er tó ikki bert hjá kvinnunum, at støðið kundi verið hægri. Støðið á mannfólkasíðuni er eisini lækkað. Grundin til hetta er, at teir royndu íðkararnir, sum hava verið við í 10-15 ár, eru givnir, og at tað nú eru yngru menninir, sum skulu taka yvir. Hetta er Sofus eisini klárur yvir.

– Støðið á føroyskari judo er lækkað munandi síðani 1995, tá vit fingu okkara besta úrslit á leikunum. Judarar sum Búgvi Poulsen, Sam Vang og Ingi á Tórgarði eru ikki við longur, og hetta er sjálvandi við til at lækka støðið. Men yngru judararnir eru eisini góðir, og teir fara heilt víst at fáa onkra medalju. Ætlanin er annars, at fleiri av ungu judarunum ikki skulu vera á toppinum fyrrenn til leikirnar á Álandi í 2009, tí er Rhodos eitt royndarár hjá fleiri av judarunum.

Sofus Johannesen leggur afturat, at tað hevur alstóran týdning fyri judo, at tað verður fastur partur av Oyggjaleikunum. Tí hevur Judosambandið tosað við onnur Judosambond, og tey eru blivin samd um at senda nógvar judarar avstað, fyri at fáa eina so góða judokapping á Rhodos sum møguligt. Hetta verður gjørt, fyri at judo skal fáa betri møguleikar at gerast fastur partur av leikunum. Verður kappingin á Rhodos væleydnað, so er ikki óhugsandi, at aðrir vertir fara at taka judo við til leikirnar.

At enda sigur Sofus seg vóna, at hetta verður byrjanin til eitt nýtt og gott tíðarskeið fyri føroyska judo. Hann vónar, at fleiri føroyingar fara at fáa eyguni upp fyri judo, ikki minst kvinnurnar.

## FAKTA UM JUDO Í FØROYUM

Fyrsta føroyska judofelagið verður sett á stovn i Havn í 1971.

Tvey ár seinni verður annað judofelagið stovnað. Hesaferð eru tað klaksvíkingar, sum fara í gongd við judo.

Í 1981 verða tvey nýggj judofeløg sett á stovn, nevnliga Sunda Judofelag og Vága Judofelag. Í samband við, at tað nú eru fleiri enn trý judofeløg í landinum, ber til at seta eitt sersamband á stovn undir Ítróttasamband Føroya. Ein mánað eftir at Sunda Judofelag er stovnað, verður Judosamband Føroya sett á stovn.

Í árunum eftir at Judosambandið er sett á stovn, verða tvey nýggj feløg stovnað: Kollafjarðar Judofelag og Vágs Judofelag.

Hesi nýggju feløgini høvdu tó ikki langa livitíð, og nøkur ár seinni vóru aftur bert trý feløg í landinum, eftir at Vága Judofelag, Kollafjarðar Judofelag og Vágs Judefelag máttu gevast við sínum virksemi.

Hóast Judosambandið vísti sín áhuga, so eydnaðist ikki at fáa judo við á fyrstu Oyggjaleikirnar á Isle of Man og Guernsey, men á leikunum í Føroyum í 1989 eydnaðist tað.

Judo gjørdist ein fastur partur av Oyggjaleikunum fram til leikirnar í 1995, og Føroyar fingu frálík úrslt við fleiri medaljum. Hæddarpunktið kom, tá Føroyar á leikunum í 1995 vunnu gull í liðkappingini.

Síðani 1995 hevur judo ikki verið partur av Oyggjaleikunum, og í tíðini eftir 1995 er Klaksvíkar Judofelag eisini givið við sínum virksemi.

12 ár skuldu ganga, áðrenn judo aftur bleiv tikið við í oyggjaleikaskránna. Næsta summar er judo á skránni á Rhodos, og hetta verður vónandi árið, tá judo aftur skal fáa lív lagað í Føroyum. Judo er harafturat sett á skránna til leikirnar á Álandi í 2009. Í 2011 verða leikirnar á Isle og Wight, og her var judo partur av leikunum í 1993, seinast leikirnir vóru á Isle of Wight.

Í hesum sambandi vónar Judosambandið, at judoítróttin fer at fáa fleiri luttakarar í Føroyum, og at onkur av givnu judofeløgunum fer at fáa gongd á sítt virksemi aftur.